

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## Húsavørður til Skúlan við Løgmannabreyt

Tórshavnar kommuna søkir eftir húsavørði til Skúlan við Løgmannabreyt.

Dagligu arbeiðsuppgávurnar hjá húsavørðinum eru í neyvum samstarvi við leiðslu skúlans.

**Arbeiðsuppgávur eru m.a. at:**
- skipa fyri, at skúlin verður røktur
- røkja og halda økið uttan um skúlan
- gera smáar umvælingar
- síggja til, at el, vatn, hiti og sanitetsviðurskiftini eru í lagi
- røkja ventilatiónina
- hava ábyrgd av, at brunaviðurskiftini og trygdarútbúnaðurin eru í lagi
- hava ábyrgd av reingerðini í skúlanum

**Vit vænta okkum, at umsøkjari hevur:**
- handverkaraútbúgving ella aðra javnsetta útbúgving og royndir
- góð samstarvsevni, er røkin og hevur førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- koyrikort
- teldukunnleika á brúkarastigi, tó eingin treyt

Kommunan skipar fyri skeiðum at halda bygningar.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast gjørligt. Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmálanum millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið frá Haraldi Bjørgvin, leiðara fyri húsaumsitingini, á telefon 30 20 10 ella Høgna Joensen, skúlastjóra, á telefon 21 41 09.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvum, møguliga viðmælum og upplýsingum um arbeiðsroyndir skal vera Tórshavnar kommunu, postrúmi 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi hósdagin 12. juni 2008. Merkið umsóknina: Húsaumsitingin.

## Pedagogar til Býlinghúsið undir Fjalli

Søkt verður eftir tveimum pedagogum at arbeiða 30-35 tímar um vikuna at byrja 4. august 2008 ella eftir nærri avtalu. Eisini verður søkt eftir einum pedagogi, fyri pedagog í farloyvi, at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 4. august 2008 og fram til 30. juni 2009.

Um ongin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Ingigerð Holm, stovnsleiðara, tlf. 302230 ella 228525 ella við at hyggja á heimasíðuna www.undirfjalli.fo

**Umsókn**
saman við møguligum viðmælum skal vera hjá Býlingshúsinum undir Fjalli, Fjalsgøta 25, 100 Tórshavn í hendi seinast mánadagin 23. juni 2008.

## Varaleiðari og pedagogar til Dagstovnin í Løkjatúni

eftir einum varaleiðara at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 1.august 2008 ella eftir nærri avtalu. Eisini verður søkt eftir tveimum pedagogum, ein til vøggustovuna og ein til barnagarðin at arbeiða 30-35 tímar um vikuna at byrja 1. august 2008 ella eftir nærri avtalu. Til frítíðarskúlan verður eisini søkt eftir tveimum pedagogum at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 15. august 2008 ella eftir nærri avtalu.

Um pedagogur ikki søkir eru onnur við kreativum førleikum vælkomin at søkja.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Gudrun Winthereig Rasmussen, stovnsleiðara, telefon 30 23 90 / 21 90 19.

**Umsókn**
saman við møguligum viðmælum skal vera hjá Dagstovninum í Løkjatúni, Løkjatún 5, 160 Argir, í hendi innan mánadagin 23. juni 2008.

## Pedagogur til Dagstovnin Látri

Søkt verður eftir eftir einum pedagogi at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja 4. august 2008 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Guðrun S. Hansen, stovnsleiðara, telefon 30 24 62.

**Umsókn**
saman við møguligum viðmælum skal vera hjá Dagstovninum Látrið, 270 Nólsoy, í hendi seinasta lagi mánadagin 23. juni 2008.

## Pedagogar til Dagstovnin í Hoyvík

Søkt verður eftir trimum pedagogum til vøggustovu at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 4. august 2008 ella eftir nærri avtalu. Eisini verður søkt eftir trimum pedagogum til barnagarð at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 4. august 2008 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Onnu Mariu E. Antoniussen, stovnsleiðara á telefon 30 22 50 ella 21 73 18.

**Umsókn**
saman við møguligum viðmælum skal vera hjá Dagstovninum í Hoyvík, Vegurin langi, 188 Hoyvík, í hendi innan mánadagin 23. juni 2008.

**Tórshavnar kommuna**